# Musikkskúla Miðnám

## Upptøkuroynd

**Tónleikaverk**

Umsøkjarin framførir tvey stykkir við ymiskum huglagi. Minst annað stykkið skal framførast við samanspæli.

Viðm. Skúlin útvegar ikki umsøkjarum klaverfylgispælara ella samanspælsbólk til upptøkuroyndina, men skúlin kann hjálpa umsøkjarum at finna ein.

**Prima vsita – secunda vista**

Prima vista roynd í blaðsangi (við hjálp frá klaverfylgispælara).

**Fyrisøgn**

Endurgeva (syngja) stuttar raddarvenjingar.

Viðm. *Vegleiðing til royndina*

1. Hugsa tær royndina sum eina musikalska heild – eina konsert.
2. Ger tað, sum tú dugir best innan karmar, sum tú kennir teg heima í.
3. Vel eitt torleikastig, sum ikki órógvar musikalska úrslitið.
4. Hugsa fjølbroytni viðvíkjandi tempo og dynamiskum eyðkenni.

# Lesiætlan

## Endamál

1. At menna og styrkja teknisku og musikalsku førleikar næmingsins so teir røkka einum støði, sum svarar til upptøkukrøvini til konservatorium.
2. At menna grundleggjandi førleikar næmingsins sum solistur og ensembletónleikari.
3. At næmingurin verður førur fyri at luttaka í og kennir seg heima í so breiðum parti av klassisku tónleikamentanini sum gjørligt bæði viðvíkjandi stíli og sjangru.

## Innihald

Við einum stílsligum fjølbroyttum og breiðum repertoire verður arbeitt við at menna førleikar næmingsins á økjum sum t.d.:

1. Musikalskur framburður
2. Imitatión
3. Teknikkur (fimi)
4. Klangskapan og -menning
5. Motorikkur og koordinatión
6. Nótalesing
7. Tónalesing

**Repertoire** – dømi um tilfar, ið verður nýtt í undirvisingini

1. Schirmer's Library of Musical Classics: Twenty-Four Italian Songs and Arias of the Seventeenth and Eighteenth Centuries
2. Haydn: Canzonettas and Songs
3. Händel: 45 Arias from Operas and Oratorios for voice and piano
4. Schubert, Schumann, Franz, Brahms, Wolf, Mahler, Strauss: 50 German Songs for voice and piano
5. Ymiskt út sangleikum so sum: Phantom of the Opera, Sound of Music, Les Misérables, Chess, West Side Story, Jesus Christ Superstar o.fl.
6. Harafturat føroyskt og norðurlendskt klassiskt tilfar, eldri og nýtt.

# 1. ársroynd

## Tónleikaverk

Næmingurin framførir tvey ella fleiri stykkir (uttanat), sum eru ólík í lyndi og frá tveimum ella fleiri ymiskum tíðarskeiðum.

## Secunda vista

Blaðsangur. Næmingurin fær eitt brot úr einum sangi at fyrireika seg uppá dagin fyri royndina, sum verður framført a capella til royndina.

## Sangtekniskir førleikar

1. Greið frá grundleggjandi meginreglum um sunt raddarbrúk:
   Stuðul (herundir "nátúrligur stuðul" og "aktivur stuðul")
   Twang (hvussu arbeiða vit við tí, og hvørjir eru fyrimunirnir)
   Samandráttarvøddar (herundir "falskur stuðul", og hvussu tað ávirkar sangaran, um vøddarnir verða eru spentir).
2. Næmingurin syngur strofur við vibrato, staccato, legato og luft/ikki luft á røddini.

## Tónastigar o.a.

Næmingurin syngur fylgjandi tónastigar (við solfa): Teir sjey kirkjutónaskalarnar – ioniski, doriski, frygiski, lydiski, mixolydiski, æoliski, lokriski.

## 2. ársroynd

### Tónleikaverk

Næmingurin framførir tvey ella fleiri stykkir (uttanat), sum eru ólík í lyndi og frá ymiskum tíðarskeiðum. Sungið verður á minst tveimum ymiskum málum (tildømis italienskt, týskt, enskt, norðurlendskt)

### Prima vista

Blaðsangur. Næmingurin fær 2-3 min. at fyrireika seg og syngur síðani eitt brot úr einum verki (við hjálp frá einum klaverfylgispælara)

### Sangtekniskir førleikar

1. Næmingurin syngur arpeggios í dur og moll.
2. Næmingurin syngur strofur við ymiskum klangi – t.d. myrkt, ljóst og miðal – og greiðir frá, hvussu til ber at broyta klangin við seks ymiskum háttum.
3. Næmingurin syngur strofur við denti á vibrato, staccato, legato og melisma.

### Tónastigar

# 3. ársroynd

## Tónleikaverk

Næmingurin framførir trý ella fleiri stykkir (uttanat), sum eru ólík í lyndi og frá ymiskum tíðarskeiðum. Minst eitt stykki skal framførast a cappella. Sungið verður á minst tveimum málum (tildømis italienskt, týskt, enskt, norðurlendskt)

## Prima vista

Blaðsangur. Næmingurin fær 2-3min. at fyrireika seg og syngur síðani eitt brot úr einum verki (við hjálp frá klaverfylgispælara).

## Sangtekniskir førleikar

1. Næmingurin greiðir frá og syngur brot úr einum verki við denti á dynamiska variatión.
2. Næmingurin greiðir frá og syngur brot úr einum verki við denti á variatión í klangi
3. Næmingurin syngur strofur við vibrato, staccato, legato, melisma og trills.

## Tónastigar o.a.

Næmingurin syngur fylgjandi tónastigar (við solfa): Blues, heiltóna- og kromatiskur tónastigi. *G.G. Tónastigar frá undanfarnum ársroyndum kunnu koma fyri aftur: Harmoniskur moll, jazz moll, melodiskur moll, dur-pentaton og kirkjutónaskalar.*